KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 29.11.2018 kl. 17:30

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Óli M. Lassen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen.

Kjartan á Gravarbø møtti fyri Kristian Eli Zachariasen

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
114/18	18/01333-1	Býráðslimur forfall - Kristian Eli Zachariasen
115/18	18/00496-50	Fíggjarætlan 2019, Klaksvíkar Býráð - *seinna viðgerð*
116/18	18/01247-2	Áseting av fundardøgum 2019 – Klaksvíkar býráð
117/18	18/01196-2	Marknaumskipan til ummælis - matr. nr. 804 og 632a
118/18	16/01034-42	Norðoya Kunningarstova
119/18	17/01188-80	Staðseting og kostnaðarmeting; skáli til Fjallafípuna – *seinna viðgerð*

Til viðgerðar

114/18
18/01333-1 Býráðslimur forfall - Kristian Eli Zachariasen

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	29.11.2018	114/18	

Frágreiðing um málið:
Kristian Eli Zachariasen, býráðslimur, hevur boðað borgarstjóranum frá, at hann er burturstaddur í tíðarskeiðinum 26. nov. til 10. des. og tí ikki fær møtt til býráðsfundin 29. nov. 2018.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin, § 18:

Stk. 2. Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.
Stk. 3. Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

Fíggjarligar avleiðingar:
Samsýning til tiltakslimin.

Tilmæli:
Býráðið verður at taka støðu til, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

Býráðsins samtykt 29-11-2018
Einmælt samtykt, at lata næstvalda á valevnislistanum, Kjartan á Gravarbø, taka sæti fyri Kristian Eli Zachariasen.

115/18
18/00496-50 Fíggjarætlan 2019, Klaksvíkar Býráð - *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	29.11.2018	115/18	

Frágreiðing um málið:
Á felags nevndarfundi í UBN, HaVN, MeN, B&U, E&B, TN og FíN 19. nov. 2018 varð einmælt samtykt at beina niðanfyri standandi fíggjarætlan fyri 2019 til endaliga avgreiðslu í býráðnum:

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Inntøkur	kr.	270.000.000
Rakstur í alt	kr.	195.900.000
Rakstraravlop	kr.	74.100.000
Rentustuðul	kr.	3.600.000
Rentur	kr.	4.000.000
Avdráttir	kr.	0
Eftir til íløgur og íløgustuðul	kr.	66.500.000
Íløgustuðul		
Húsarhaldsskúlin	kr.	4.000.000
Mentanarpallur	kr.	1.000.000
	kr.	5.000.000
Íløgur		
Á Skúlatrød	kr.	22.700.000
Spillivatn	kr.	2.000.000
Bláa Skýlið	kr.	1.900.000
Fastognir	kr.	2.000.000
Vegir, íløga	kr.	4.800.000
Miðbýur	kr.	12.000.000
Rennibreyt	kr.	3.500.000
Havna- og vinnuøkið	kr.	2.000.000
Vøllur (víðkan + ljósfundament)	kr.	1.700.000
Vøllur (ljósmastrar og ljós)	kr.	1.900.000
Vøllur (graslíki)	kr.	1.500.000
Nýggjur barnagarður	kr.	4.000.000
Spælipláss	kr.	1.500.000
Samlaðar íløgur og íløgustuðul	kr.	66.500.000
Samlað úrslit		0

Harumframt varð samtykt at endurskoða íløgukarmin í apríl 2019.

<u>Lógargrundarlag:</u>
Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003

§ 39. Fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.
Stk. 2. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.
§ 40. Tá fíggjarætlanin er endaliga samtykt, verður eisini útskrivingin av kommunuskattinum fyri komandi árið samtykt við fíggjarætlanini sum grundarlag. Samtykta fíggjarætlanin er á sama hátt bindandi fyri kommunalu umsitingina komandi fíggjarárið.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Fíggjarligar avleiðingar:

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til endaliga at taka støðu til og avgreiða fíggjarætlan býráðsins galdandi fyri árið 2019. Harumframt verður mælt til at áseta skattaprosent og barnafrádrátt fyri árið 2019.

Býráðsins samtykt 29-11-2018
Atkvøtt varð um felags tilmælið frá nevndunum 19. nov. 2018 (temafundur II); tilmælið varð einmælt samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Sostatt er **fíggjarætlan Klaksvíkar Býráðs fyri 2019** samtykt við hesum tølum:

Inntøkur	kr.	270.000.000
Rakstur í alt	kr.	195.900.000
Rakstraravlop	kr.	74.100.000
Rentustuðul	kr.	3.600.000
Rentur	kr.	4.000.000
Avdráttir	kr.	0
Eftir til íløgur og íløgustuðul	kr.	66.500.000
Íløgustuðul		
Húsarhaldsskúlin	kr.	4.000.000
Mentanarpallur	kr.	1.000.000
	kr.	5.000.000
Íløgur		
Á Skúlatrød	kr.	22.700.000
Spillivatn	kr.	2.000.000
Bláa Skýlið	kr.	1.900.000
Fastognir	kr.	2.000.000
Vegir, íløga	kr.	4.800.000
Miðbýur	kr.	12.000.000
Rennibreyt	kr.	3.500.000
Havna- og vinnuøkið	kr.	2.000.000
Vøllur (víðkan + ljósfundament)	kr.	1.700.000
Vøllur (ljósmastrar og ljós)	kr.	1.900.000
Vøllur (graslíki)	kr.	1.500.000
Nýggjur barnagarður	kr.	4.000.000
Spælipláss	kr.	1.500.000
Samlaðar íløgur og íløgustuðul	kr.	66.500.000
Samlað úrslit		0

Harumframt var einmælt samtykt at taka undir við einum **skattaprosenti á 20,75 %** og einum **barnafrádrátti á 5.500 kr.**

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

116/18
18/01247-2 Áseting av fundardøgum 2019 – Klaksvíkar býráð

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	29.11.2018	116/18	

Frágreiðing um málið:
Býráðið skal við ársbyrjan almannakunngera, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir. Á seinasta býráðsfundinum í árinum avger býráðið vanliga, nær fundirnir fyri komandi árið skulu haldast.

Hesir fundardagar eru í uppskoti til býráðsfundirnar í 2019:

31.	januar	27.	juni
28.	februar	29.	august
28.	mars	26.	september
2.	mai	31.	oktober
29.	mai (*mikudagur*)	28.	november

Fundir Klaksvíkar býráðs verða vanliga hildnir í býráðshøllini - Nólsoyar Páls gøta 32, Klaksvík.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin:
§ 13. *Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. ... Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.*

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til uppskotnu fundardagarnar.

Býráðsins samtykt 29-11-2018
Einmælt samtykt at taka undir við uppskotnu fundardøgunum fyri 2019.
Harumframt einmælt samtykt at heita á umsitingina um at kanna, um ein av hesum fundunum kann verða hildin í onkra aðrastaðni í kommununi enn í Klaksvík.

117/18
18/01196-2 Marknaumskipan til ummælis - matr. nr. 804 og 632a

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	19.11.2018	118/18	
2 Klaksvíkar Býráð	29.11.2018	117/18	

Frágreiðing um málið:
Eigarin av matr. nr. 804 hevur gjørt avtalu við eigaran av matr. nr. 632a um keyp av einum 2,5 metra breiðum geira at leggja afturat ogn síni framvið vesturmarkinum.
Áðrenn umskipanin kann matrikulerast, má fyriliggja býráðsins ummæli til broytingina.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

Tilmæli:
Umskipanin er innbygd í fyriliggjandi uppskot til útstykking av økinum undir Fossum (sí mál 18/00061), og mælir tekniska fyrisiting tí til at senda Umhvørvisstovuni málið við tilmæli um góðkenning.

UBN 19-11-2018
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-11-2018.

Býráðsins samtykt 29-11-2018
Tilmælið frá UBN 19-11-2018 einmælt samtykt.

118/18
16/01034-42 Norðoya Kunningarstova

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	26.11.2018	133/18	
2 Klaksvíkar Býráð	29.11.2018	118/18	

Frágreiðing um málið:
Formaðurin fyri Norðoya Kunningarstovu hevur vent sær til kommununa og kunnað um fíggjarligu støðuna, nú leiðarin hevur sagt seg úr starvi og er farin í annað starv.

Smb. uppgerðum og metingum frá Kunningarstovuni er tørvur á kr. 150.000,- til tess at fáa avgreitt fíggjarligu skyldurnar restina av árinum.

Í juni er samtykt at gera eina greining av Kunningarstovuni. Hetta arbeiðið er í gongd og er mett at kosta kr. 100.000,-, sum verður fíggjað av "*Vinnumenning*".

Lógargrundarlag:
Fíggjarætlanin 2018

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongin – avseting er tøk innan *Vinnumenning*

Tilmæli:
Mælt verður til at taka undir við málinum og játta kr. 150.000,- av *Vinnumenning* til Kunningarstovuna.

FíN 26-11-2018
Nevndin tekur undir við málinum og mælir til, at vinnudeildin verður við til at mynda framtíðar virksemið í Kunningarstovuni.

Býráðsins samtykt 29-11-2018
Tilmælið frá FíN 26-11-2018 einmælt samtykt.

119/18
17/01188-80 Staðseting og kostnaðarmeting; skáli til Fjallafípuna – *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	22.10.2018	102/18	
2 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	23.10.2018	43/18	
3 Ferðslunevndin	24.10.2018	K-4/18	
4 Fíggjarnevndin	29.10.2018	104/18	
5 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	31.10.2018	109/18	
6 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	29.11.2018	119/18	

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 31. oktober 2018.

UBN 22-10-2018
Nevndin tekur undir við staðseting 1, og verður tann fíggjarligi parturin viðgjørdur á Temafundi II, íløgukarmur.

TrN B&U 23-10-2018
Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini vegna ógegni.
Nevndin tekur undir við UBN 22.10.18.

FeN 24-10-2018
Málið verið til kunning.

FíN 29-10-2018
Nevndin tekur undir við UBN 22-10-2018 og B&U 23-10-2018.

Býráðsins samtykt 31-10-2018
Atli S. Justinussen metti seg ógegnigan at viðgera málið. Atkvøtt varð um gegnisspurningin. Samtykt, at Atli S. Justinussen ikki er ógegnigur at viðgera málið við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen og Beinta Klakstein) og 5 atkvøðum ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

Tilmælið frá FíN 29-10-2018 einmælt samtykt.

Býráðsins samtykt 29-11-2018
Atli S. Justinussen metti seg ógegnigan at viðgera málið. Atkvøtt varð um gegnisspurningin. Samtykt, at Atli S. Justinussen ikki er ógegnigur at viðgera málið við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig, Kjartan á Gravarbø, Óli M. Lassen og Beinta Klakstein) og 5 atkvøðum ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

Einmælt samtykt við seinnu viðgerð.